## Flokssting Tjóðveldisfloksins

# Nógv at arbeiða fyri í andstøðu

**Tjóðveldisflokkurin hevði floksting í Klaksvík um vikuskiftið, og í formansfrágreiðing síni legði formaður floksins Høgni Hoydal millum annað dent á, at flokkurin hevur nógv at arbeiða fyri nú hann er í andstøðu. Eisini kom týðuliga fram, hvussu lítið flokkurin heldur um sitandi samgongu**

FLOKSTING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Formaður Tjóðveldisfloksins Høgni Hoydal legði í formansfrágreiðing sínari dent á, at flokkurin hevur nógv at arbeiða fyri nú hann situr í andstøðu*

**Klaksvík:**
Í formansfrágreiðing sínari á flokstingi Tjóðveldisfloksins hevði Høgni Hoydal eina gjøgnumgongd av tí, sum farið er fram síðani seinasta floksting.

– Fyri sjey árum síðani sótu vit her í Klaksvík seinast, og tá vóru vit í andstøðu og skuldu brynja okkum til nýggjar avbjóðingar og lunnar vórðu lagdir til nýggj politisk frambrot og til at taka við einum longri tíðarskeiði í samgongu. Nú er flokkurin størsti flokkur á tingi – og aftur í andstøðu. Og vit brynja okkum til aftur at gera frambrot og at taka ábyrgd sum flokkur í einum broyttum politiskum veruleika, legði Høgni út við.

Hann legði í røðu sínari dent á, at fyri tað um flokkurin nú er í andstøðu, so ræður um ikki at setast afturá.

– Tjóðveldisflokkurin hevur altíð tikið ábyrgd í føroyskum politikki. Vit taka ábyrgd í samgongu og í landsins leiðslu – men vit taka sanniliga eisini ábyrgd í andstøðu, segði Høgni millum annað.

Formaðurin duldi ikki, at hann heldur lítið um Fólkaflokkin og samstarvið við hann. Hann vísti á, at Fólkaflokkurin hevði bakkað út, tá fullveldið kom ov nær, og at hetta ikki var fyrstu ferð, tað var hent.

Formaður Tjóðveldisfloksins greiddi eisini frá úrslitum floksins í farna valskeiði, og yvirhøvur var ikki nógvur sjálvkritikkur í røðu hansara.

Hann nevndi nøkur mál, har hann ikki helt, at tað var eydnast Tjóðveldisflokkinum at koma á mál, men nógv tann størri parturin av røðuni snúði seg heldur onnur mál og viðurskifti.

Høgni segði eisini, at tað tykist sum at tann borgarliga sambandssamgongan tykist bert at hava eitt høvuðsmál. At halda saman og leggja sjógv til Tjóðveldisflokkin.

Og so legði hann afturat, at tað ikki er nakað nýtt sum so í tí.

Høgni endaði sína røðu við at siga, at Tjóðveldisflokkurin hevur alla orsøk at arbeiða uppaftur meiri , nú hann er í andstøðu, til tess at røkka floksins málum.

### Tamt orðaskifti

Tá formansfrágreiðingin var liðug, tók Heini O. Heinesen, fyrrverandi løgtingslimur Tjóðveldisfloksins orðið.

Hann byrjaði við at rætta formann floksins, tá hesin segði, at Tjóðveldisflokkurin er størsti flokkur á tingi.

Hann minti á, at flokkurin var størstur í atkvøðutali í 1998. Heini var vælupplagdur hendan morgunin og skemtiligur. Líka so nógv, sum fólk klappaðu eftir umrøðuni hjá formanninum av fíggjarlógaruppskotinum hjá sitandi samgongu, flentu tey at Heina og hansara skemtiligu søgum.

Eitt nú helt Heini fyri, at Edmund Joensen helt, at tað kom so nógvur fiskur, bara tí hann var løgmaður tann tíð tað var.

Rúni Nielsen, formaður í Unga Tjóðveldinum helt lítið um sitandi samgongu, og tað gjørdu aðrir viðmerkjarar eisini. Heini ávaraði tó hinvegin í móti at fara ov illa við møguligum framtíðarsamstarvspørtum hjá Tjóðveldisflokkinum.

### Gestarøðarar

Steingrím J. Sigfússon, íslendskur altingslimur og formaður í flokkinum Vinstri Grænir var annar gestarøðarin á tinginum. Ætlanin var, at eitt umboð úr IA í Grønlandi eisini skuldi vitja flokstingið, men hesin hevði fingið forfall. Og so vóru Egil Olsen og Malena Arnholdsdóttir eisini við á tinginum, har tey hildu fyrilestur um virðisøking av ávíkavist vinnuni og menniskjanum í samfelagnum.

Steingrím J. Sigfússon segði millum annað, at hann hevur altíð fylgt væl við í sjálvstýrisgongdini í Føroyum.

– Sjálvandi eru tað føroyingar sjálvir, sum við sínum avgerðum eiga at ráða ferðini í loysingarspurninginum. Vit politikarar og umboð fyri onnur lond, virða sjálvandi fólkaræðisliga tiknar avgerðir hjá tjóðum við sjálvsavgerðarætti í samsvari við fólkarættin. Tað gera vit íslendingar, og tað eiga danir eisini at gera. Eg persónliga havi ongantíð dult fyri, hvør mín hugsan í hesum máli er, og hon er, at eg av heilum huga stuðli sjálvstýrisstríði tykkara, segði Steingrim J. Sigfússon.

Hann kom eisini inn á hetta, at komandi ár eigur Ísland formansskapin í Norðurlandaráðnum.

– Eg haldi, at tað hevði verið eitt virðiligt tiltak, um vit, meðan vit høvdu formansskapin, fingu í lag, at eitt álit varð gjørt, um á hvønn hátt slíkur fullgildigur og sjálvstøðugur limaskapur og luttøka kunnu fáast til vega við grundarlagi í broytingum í Helsingforssamtyktini. Hetta er helst ein høgligari leið at ganga enn at broyta donsku grundlógina. Eg fyri mín part er, ið hvussu so er tilreiðar at stríðast fyri hesum, segði Steingrim J. Sig-fússon at enda í røðu sínari, har hann somuleiðis bar starvsfeløgum sínum í Tjóðveldisflokkinum góðar heilsanir.



Eitt tamt orðaskifti og ikki so nógv fólk vóru til flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum á Tekniska skúla í Klaksvík um vikuskiftið



Íslendski altingsmaðurin og formaðurin í Vinstri Grænir Steingrim J. Sigfússon var gestarøðari á flokstinginum



## Flokssting Tjóðveldisfloksins




*Malena Arnholdsdóttir forkvinna í Javna helt fyrilestur um virði í menniskjanum á flokstinginum hjá Tjóðveldisflokkinum*

# Virði í menniskjanum

**Øll menniskju hava virðir og evni, sum kunnu mennast. Eitt menniskja hevur ikki virði í tí, tað er, men tí tað er. Hon mælti til miðvíst at geva menningartarnaðum rætt til bústað og arbeiði, og at fáa greiningarmiðstøð setta á stovn**

FLOKSTING
*Solby /Anna*
*solby@sosialurin.fo*
*ave@post.olivant.fo*

**Klaksvík:**
Á flokstinginum hjá Tjóðveldisflokkinum um vikuskiftið helt Malena Arnholdsdóttir, forkvinna í Javna fyrilestur. Hon hevði eina gjøgnumgongd av søguni hjá Javna. Hon greiddi frá, hvat Javni er, frá virkseminum hjá Javna og framtíðarætlanum og ynskjum hjá felagnum.

Somuleiðis greiddi hon frá, hvussu tað er at vera foreldur at einum menningartarnaðum.

Heitið á flokstinginum hjá Tjóðveldisflokkinum var virðisøking av tilfeinginum. Og varð Malena hildin at vera uppløgd til at halda fyrilestur við atliti at teimum menniskjaligu virðunum.

– Tjóðveldisflokkurin vil hava eitt samfelag, har øll hava sama rætt og møguleika til at mennast, sigur Høgni Hoydal, formaður floksins.

Hann heldur, at Malena kom avbera væl frá sínum fyrilestri, og við teimum trimum gestarøðarunum heldur hann, at flokkurin megnaði væl at fáa virðisøkingina av samfelagnum lýsta – bæði hvat viðvíkur vinnuni, altjóða og menniskjasliga tilfeingið.

Tað vóru ikki so nógv fólk og lýddu á, men fyrilesturin var áhugaverdur, og aftaná var eitt orðaskifti, har fólk fingu høvi til at gera viðmerkingar og seta spurningar.

Ikki óvæntað, kom orðaskiftið eisini at snúgva seg um nógv umrøddu skanningarnar av downssyndromi.

Malena sjálv meinti, at komandi foreldur áttu at verið spard fyri at skula taka støðu til, um tey skuldu velja eitt brekað barn til ella frá. Hon vísti á, at í hesum føri kann vísundin hvørki gera frá ella til.

– Vísundalig framstig eru kærkomin, tá tey kunnu verða við til at lekja ella hjálpa uppá sjúku ella brek. Tað kunnu tey ikki í hesum føri. Skanningar fyri downssyndrom kunnu bert staðfesta brekið og síðani verða við til at loyva fosturtøku, segði Malena.



*Høgni Hoydal heldur, at tingið livdi væl upp til sítt endamál Virðisøking av tilfeinginum við teimum trimum gestarøðarunum, Egil Olsen við atliti til vinnuna, Steingrim J. Sigfússon til altjóða tilfeingið og Malena Arnholdsdóttir til menniskjasliga tilfeingið*

### Skeivar niðurstøður

Orðaskiftið tók eina heldur øðrvísið vend, tá ein pápi greiddi frá, hvussu hesar skanningar eisini kunnu koma til skeivar niðurstøður. Fyrsta skanningin av teirra fostri vísti, at barnið fór at vera fjølbrekað, um tað yvirhøvur livdi. Ein seinni skanning vísti hinvegin, at onki var galið. Og í dag eiga tey eina fríska og sunna dóttir.

Maðurin greiddi frá, at um hann og konan ikki høvdu havt orku og fíggjarligar umstøður til at fara uttanlanda at fáa eina aðra skanning, høvdu tey uttan iva valt fosturtøku, tí útlitini fyri heilsuni hjá dótturini vóru vónleys. Hann vísti á, at øll ikki hava somu umstøður, at biðja um eina aðra meting av hesum skanningarúrslitum, tí tað er bæði orkukrevjandi og kostnaðarmikið.

– Í ringasta føri kann hetta hava við sær eina órættvísa og óhugnaliga gongd, har tað verða sosialar umstøður sum gera av, hvørjar upplýsingar fólk fáa at taka støðu út frá, segði hann.

### Tolsemi

Annars tóktist breið semja at vera um, at brekað børn eiga at sleppa at ganga í vanligum skúla so leingi til ber.

– Hetta snýr seg ikki bara um tey brekaðu, men eisni um eina hugburðsbroyting í restini av samfelagnum. Ein slík kemur ikki eftir einari løtu og bara, um vit hava tey brekaðu ímillum okkum í gerandisdegnum, segði ein av áhoyrarnum. Kvinnan, ið sjálv er lærari, visti av egnum royndum, at í skúlaflokkum, har brekað børn eisini eru, er tolsemið mótvegis teimum, ið onkusvegna eru øðrvísi, munandi størri.

### Menniskjalig virði

Til seinast tók Malena Arnoldsdóttir samanum við at minna á, at grundleggjandi snýr hetta kjakið seg, hvat slag av samfelag vit vilja hava.

– Tað er onki at dylja yvir, at tey brekaðu hava lægri status enn onnur í okkara nútímans samfelag. Men tað kemst av, at samanberingargrundarlagið er skeivt frá byrjan. Tey verða mett út frá tí, teimum vantar í mun til onnur og ikki út frá egnum treytum. Men vit eiga at minnast til, at menniskju hava jú ikki virði í tí, tey eru, men tí tey eru, segði forkvinnan í Javna at enda.

*Fleiri áhugaverdar viðmerkingar og spurningar vóru undir orðaskiftinum eftir fyrilesturin hjá forkvinnuni í Javna. Millum annað kom fram, at breið semja tyktiskt at vera millum fólk, at brekað eiga at kunna ganga í vanligum skúla so longi sum tilber*

